# BA hækkar gjøld

Bretska flogfelagið British Airways kunngjørdi í gjár, at tað hevur gjørt av at hækka gjaldið, sum fólk rinda fyri at hava meiri enn tvær taskur ella kuffert sum viðføri. Sum er rinda fólk 32 sterlingpund fyri tað triðja kuffertið, men frá 10, november hækkar gjaldið upp í 72 pund. Tað eru bara nakrir fáir mánaðir, síðani British Airways hækkaði gjaldið hjá teimum, sum vilja hava eitt ávíst pláss í flogfarinum. Leiðslan í BA sigur, at hon er noydd at krevja meiri frá ferðafólkunum, eftir at starvsfólk frelagsins sýttu fyri at góðtaka at sleppa lønarhækkingum og at fara niður í løn.




# Bakteria legði trolara

Teir 16 menninir, sum eru við einum kanadiskum trolara, sum liggur í havnini í Nuuk, sleppa ikki í land. Grønlendski landslæknin hevur givið boð um at avbyrgja skipið, tí at stafylokok-bakteriur eru staðfestar umborð. Ein av manningini mátti til lækna, tí hann hevði opið sár, sum ikki vildi grógva aftur. Kanningar á sjúkrahúsinum í Nuuk vístu, at talan var um eina stafylokok-bakteriu, skrivar KNR. Landslæknin gav boð um at avbyrgja manningina, samstundis sum reingerðarfólk fóru umborð at reinsa skipið. Hinir menninir vóru ikki smitaðir.

# Aftur eitt oljufund vestan fyri Hetland

**Ikki minni enn trý olju- og gassfund eru gjørd vestan fyri Hetland henda seinasta mánaðin. Einki er at ivast í, at áhugin fyri økinum fer at vaksa sum frálíður.**

OLJULEITING
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Oljufelagið Hurricane Exploration hevur gjørt eitt oljufund vestan fyri Hetland. Hetta er sostatt triðja fundið, sum er gjørt vestan fyri Hetland innanfyri stutta tíð. Fyrst var tað DONG, sum gjørdi eitt gassfund í Glenlivet brunninum har norðuri, síðani OMV, sum fann olju í Tornado brunninum longur syðri, og nú kemur so Hurricane við enn einum fundi eitt sindur syðri og eystari.

Fundið liggur á Lancaster leiðini í loyvi 205/21, ikki so langt frá verandi framleiðandi keldunum Foinaven og Schiehallion. Talan er um lætta olju, sum er óvanlig fyri økið vestan fyri Hetland, men enn restar nakað í fyri at gera fleiri kanningar og helst avmarkingarboring fyri at vita, um talan er um eitt rakstrarverdugt fund. Felagið sigur í tíðindaskrivi, at fundiðer rættiliga einastandandi, tú tað letur upp fyri nýhugsan í leitingini vestan fyri Hetland. Vegna vánaligt veður og tekniskar trupulleikar eydnaðist ikki at testa brunnin, og tí hevur felagið gjørt av antin at fara niður aftur í brunnin ella bora ein metingarbrunn komandi ár.

Í sambandi við hini bæði fundini, sum eru gjørd vestan fyri Hetland, verður eisini borað víðari. Í Glenlivet brunninum er gjørd síðuboring fyri at vita, hvussu umhvørvið í undirgrundini sær út. Sama er galdandi fyri Tornadobrunnin, har boriskipið Stena Carron nú liggur heilt tætt upp at markinum og bora síðubrunn.




*Nýggja fundið liggur sunnan fyri stóru oljukeldurnar Foinaven Schiehallion. Grøni sirkulin vísir oljufundið*

## Arbeiða við Cambo

Tað verður framvegis arbeitt við at finna fram til, um oljukeldan Cambo beint við markið skal útbyggjast. Sosialurin hevur spurt Amerada Hess, sum er fyristøðufelag, um nakað er í leysatíðindum um, at keldan gongur at markinum.Einasta viðmerking er, at feløgini viðgera og arbeiða við teimum data tey fingu frá avmarkingarbrunni, sum varð boraður fyrr í ár. Cambo liggur einans 15 fjórðingar frá Anne Marie brunninum, sum verður boraður á landgrunninum í vár.

Johan Dahl:

# Arbeiða víðari uttan Chevron

**Hóast Chevron tekur seg út úr Føroyaøkinum, so halda hini feløgini í loyvinum fram - og øll hava somu upplýsingar. Men tað er ymist, hvussu feløgini „síggja uppá tingini“ sigur Johan Dahl, landsstýrismaður í oljumálum.**

OLJULEITING
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*



*Landsstýrismaðurin í oljumálum, Johan Dahl hevur ikki mist svøvnin, hóast stóra oljufelagið Chevron rýmir*

Landsstýrismaðurin í oljumálum, Johan Dahl er ikki tikin á bóli, nú enn eitt av teimum stóru oljufeløgunum hevur tikið avgerð um at rýma úr Føroyum. Tí leitingin er óbroytt.

- Vit vita, at sohvørt kanningar í teimum ymsu loyvunum leggja vitan afturat, meta oljufeløgini um hesa vitan og gera av, hvussu víðari verður. Hetta er vanliga gongdin. Viðvíkjandi Chevron er tað t.d. soleiðis, at hóast tað tekur seg út úr økinum, so halda hini feløgini fram - og øll hava somu upplýsingar. Men tað er ymist, hvussu feløgini „síggja uppá tingini“.

Uppá fyrispurning hvørja ávirkan tað hevur, at fleiri feløg gevast her í hesum árinum sigur Johan Dahl, at tað hevur kanska ikki positiva psykologiska ávirkan, tá feløg trekkja seg út. Fyri leitingina her og nú hevur tað tó neyvan so stóra ávirkan, ti onnur feløg yvirtaka arbeiðsskyldurnar, sum longu eru avtalaðar.

Landsstýrismaðurin fegnast um, at norska oljufelagið StatoilHydro tekur yvir leiklutin hjá Chevron í 008 loyvinum, og at felagið annars raðfestir alt Føroyaøkið so høgt. –At stór og roynd feløg sum StatoilHydro vilja brúka so nógva orku uppá leiting á føroyska landgrunninum og síggja stórar møguleikar her er kærkomið. Hann leggur aftrat, at øll eygu nú eru vend móti brunninum hjá ENI, sum verður boraður næsta vár.